## Kommuna í neyð

Grønlendska kommunan Qaanaaq er í so álvarssomum fíggjarligum trupulleikum, at hon hevur biðið landsstýrið í Nuuk um hjálp. Í gjár samtykti landsstýrið, at kommunan skal fáa sjey milliónir krónur í láni, men tað verður ikki treytaleyst. Tvørturímóti krevur landsstýrið, at kommunan skal fáa fíggjarviðurskiftini í rættlag, og at hon skal hava avlop á fíggjarætlanini trý tey næstu árini. Harafturat skal lánið rindast aftur innan 1. mai í 2009.

## 2007 snið hjá Barbaru í Gongini

Á altjóða mótapallinum er Barbara í Gongni eitt av fremstu føroysku umboðunum. Hennara snið eru vird víða um. Í hesum døgum verða partar av 2007 kollektiónini hjá føroyska sniðgevanum víst sum myndafrásøgn á planet.fo. Her ber til at síggja nakað av tí nýggjasta innan hennara snið.

Sambært heimasíðu síni sniðgevur Barbara í Gongini klæði, ið venda sær til kvinnur í aldrinum 18-45 ár. Hetta eru kvinnur, ið hava ein modernaðan hugburð og sum vísa sína attitúdu. Hesar kvinnur eru sjónligar og lita sítt umhvørvi, tær seta dagskránna og flyta uttaru mørkini. Við síni útsjónd hátíðarhalda tær fjølbroytni og tað óstøðuga.

Fleiri av sniðunum, ið verða víst fram eru snið, ið Barbara vísti fram á Funky Faroe Islands herfyri.

**nud**

# Vilja ikki tvingast saman við tvørafólki

**Vágs Býráð vil ikki tvingast at leggjast saman við Tvøroyrar kommunu. Býráðslimir í Vági vísa á, at í verki vísir tað seg, at tað riggar ikki við samstarvi ímillum býráðini í Vági og á Tvøroyri**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Vágbingar eiga at krevja, at tað skal bera til at sleppa undan at leggja Suðuroy saman í tvær kommunur, heldur eitt einmælt Vágs Býráð*

Skulu kommunurnar í Suðuroy leggja saman, skal øll oyggin ikki tvingast at leggja saman í eina kommunu.

Tað samtykti Vágs Býráð einmælt í gjárkvøldið.

Á býráðsfundinum í gjárkvøldið var kommunusamanlegging til umrøðu.

Tað var Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, sum vildi hava býráðið at tosa um spurningin um kommunusamanlegging.

Tað gjørdi hon í kjalarvørrinum á, at landsstýrið nú hevur lagt uppskot fram um eina sjálvbodna kommunusamanlegging, har alt landið er býtt sundur í sjey øki.

Í hesum sambandi er ásett, at øll Suðuroyggin er eitt øki.

Í kjalarvørrinum á hesum hevur Vágs Býráð eisini lagt málið um kommunusamanlegging út til fólkaatkvøðu í Vági og hon verður annan desembur.

Á hesi fólkaatkvøðu sleppa vágbingar at siga sína hugsan um Suðuroy skal verða ein kommuna, um hon skal vera tvær kommunur ella um Vágs kommuna framhaldandi skal vera sjálvstøðug kommuna.

Borgarstjórin vísti á, at undanfarin býráð hava sagt sína hugsan um kommunusamanlegging, men hon metti, at hetta býráðið átti eisini at taka eina støðu til málið.

Og støðan hjá Vágs Býráði er púra greið: Skulu kommunurnar í Suðuroy leggja saman, skulu møguleikar skapast fyri at oyggin kann leggja saman í tvær kommunur.

### Semja um tvær kommunur

Sjálv staðfesti Kirstin Strøm Bech, at hon framvegis stendur fast við tað, hon hevur sagt áður, at skulu kommunur í Suðuroy leggja saman, skal talan vera um tvær kommunur.

– Tað er ov víttgangandi at leggja alla oynna saman í eina kommunu beinanvegin. Tí eiga vit at byrja við tveimum kommunum. Um talan so verður um eina kommunu í framtíðini, er so ein onnur søga.

Sølvi Andreasen tók fult undir við, at skal samanlegging verða, skal Suðuroy verður tvær kommunur.

Hann hevur altíð havt tað sjónarmið, at kommunurnar skuldu byrja við at samstarva, áðrenn tær løgdu saman. Men veruleikin vísir, at samstarv ímillum Vágs Kommunu og Tvøroyrar Kommunu virkar ikki.

Hans J. Joensen staðfesti, at ætlanin hjá landsstýrinum um sjálvbodna kommunusamanlegging, er ikki sjálvboðin, tí talan er um eini harraboð. Tað einasta, landsstýrið tosar um, er at Suðuroy skal vera ein kommuna.

– Men Vágs Býráð eigur at krevja, at vit fáa møguleika at leggja oynna saman í tvær kommunur. Og hann staðfesti eisini, at fólksins vilji eigur at virðast.

Svenning Borg staðfesti, at talan er um eitt stórt mál og hann metti, at tað er rætt, at skal leggjast saman, er tað rætt, at tað verður gjørd stigvíst.

Eisini hann staðfesti, at tað ber ikki til at samstarva ímillum allar kommunurnar og tí ber heldur ikki til at leggja alla oynna saman í eina kommununu.

Dánjal Bjarkhamar vísti á, at verður talan um samanlegging, eigur Vágs Býráð at krevja, at syðra helvt í Suðuroy kann fáa somu funktiónir, sum aðrar kommunur fáa. Eisini hann mælir til, at skal samanlegging verða, er rætt at byrja við tveimum kommunum í Suðuroy, so fer gongdin at vísa, hvat framtíðin hevur at bjóða.

Eisini Ásgerð Stenbergstaðfesti, at skal samanlegging verða, er rættast, at Suðuroy er tvær kommunur.

# Borgarafundur í Vági um samanlegging

**Á borgarafundinum fara norðoyingar at siga frá sínum royndum frá samanleggingum og har Jacob Vestergaard fer at greiða frá ætlanunum hjá landsstýrinum**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*

Týskvøldið 21. november verður borgarafundur í Vági, har kommunusamanlegging er á skránni.

Annan desembur verður fólkaatkvøða í Vági um kommunusamanlegging. Tá sleppa vágbingar at siga sína hugsan um Suðuroy skal vera ein kommuna, um hon skal vera tvær kommunur, ella um Vágs Kommuna framvegis skal vera sjálvstøðug kommuna.

Og fyri at brynja vágbingar at seta krossin, skipar Vágs Býráð fyri upplýsandi borgarafundi týskvøldið, har spurningurin um kommunusamanlegging skal lýsast úr ymsum sjónarhornum.

Á fundinum verður pallborð, har kommunupolitikarar norðaneftir fara at greiða frá teimum royndum, teir hava av at leggja saman og teimum sjónarmiðjum, teir annars hava.

Teir, sum fara at greiða frá, eru Rodmundur Nielsen, sum var borgarstjóri í Runavík og sum eisini var ein drívmegi aftanfyri kommunusamanlegging á Skálafirði.

Somuleiðis fer Heðin Zachariasen, borgarstjóri í samanløgdu Sunda Kommunu at siga frá teimum royndum, tey í Sundalagnum hava av at leggja saman. Johan Christiansen er bygdaráðslimur í Leirvík og hann var ikki so heitur fyri at leggja Leirvík saman við Gøtu og á fundinum í Vági fáa vágbingar at vita, hví hann ikki var tað og, hvørja støðu, hann annars hevur til spurningin.

Ogseinasti kommunalpolitikari við pallborðið er Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, sum eisini fer at siga sína hugsan.

Harumframt fer Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálaráðnum at greiða frá, hvørjar ætlanir, hann hevur á økinum og við sær hevur hann Hilmar Høgenni úr innlendismálaráðnum, sum fer at greiða frá tí teknisku síðuni av eini samanlegging.

Og at enda fer Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági at greiða frá støðuni hjá Vágs Býráð.